## Banna knív í býnum



Í seinastuni eru fleiri fólk stungin við knívi í Danmark, og nú um vikuskiftið kostaði tað einum 19 ára gomlum manni lívið tætt við Strøget í Keypmannahavn. Tað hevur fingið Danska Fólkaflokkin og Sosialidemokratarnar at skjóta upp at banna fólki at hava knív uppi á sær um náttina. Men Lene Espersen, løgmálaráðharri, tekur ikki undir við einum forboði. Hon vil heldur hava fleiri løgreglumenn út á gøtuna. Eftir galdandi reglum er tað loyvt at hava felliknív uppi á sær, men blaðið má ikki vera longri enn sjey centimetrar, og tað skal ikki bera til at læsa blaðið, tá knívurin er opin.

## Eik Banki yvirtekur Íløguspælið

Sum flestu kunnugt yvirtók Eik Banki virksemið hjá Kaupthing Banka beint áðrenn nýggjár. Við yvirtøkuni fylgdu tær skyldur, sum Kaupthing hevði frammanundan í Føroyum. Hetta merkir, at tað er Eik Banki sum hevur ábyrgdina av Íløguspælinum fram til endan. Spælið endar fríggjadagin 11. januar, so tá skuldi verið greitt, hvørjir tríggir teir bestu spælararnir eru. Vinningarnir verða handaðir við móttøku í Miðlahúsinum væntandi fyrst í næstu viku, men nærri verður kunngjørt um hetta í Sosialinum seinni í vikuni. Fyrsti vinningur er kr. 50.000, annar vinningur kr. 25.000, og triði vinningur kr. 10.000.

# Føroyar – ruskpláss fyri kemikaliur



*Í Føroyum er onki eftirlit og ongar reglur um framleiðslu, innflutning og nýtslu av kemikalium. Vørur og kemikaliur, sum onnur lond ikki ynskja at innflyta ella brúka, kunnu tí lættliga enda í Føroyum*

**Skaðiligar vørur og evni hava fría atgongd til føroyska marknaðin. Manglandi kemikaliurlóggáva ger eftirlitisarbeiðið ógjørligt og tilmæli um at seta altjóða eftirlitisskipanir í gildi í Føroyum verður ikki fylgt**

UMHVØRVI

*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Etur tú tvøst, spik og feitan sjófugl, so er vandi fyri at tú eisini fær kyksilvur, PCB og onnur kemikaliur í teg. Hesin boðskapur, ið hevur verið førdur fram í áravís, hevur fest seg hjá flest øllum føroyingum. Ein boðskapur, ið er sjónligur, og sum fólk kunnu fyrihalda seg til.

Men ikki allir boðskapir eru líka sjónligir. Eisini vanligar gerandisvørur kunnu innihalda heilsu- og umhvørvisskaðilig kemikaliur. Felagsnevnarin fyri tey mest skaðiligu er, at long tíð gongur til tey hvørva aftur úr náttúruni og tí ofta eisini hópast upp í livandi verum, eisini menniskjum.

- Kemikaliur verða ofta brúkt í vørum tí tey hava ein eginleika, sum er góður fyri vøruna. Flest kemikaliur eru óskaðilig. Men tað finst ein røð av kemikalium, sum kann skaða heilsu og umhvørvi, sigur Maria Gunnleivsdóttir Hansen, lívfrøðingur á Umhvørvisstovuni.

### Óteljandi dømi

Sum dømi nevnir Maria Gunnleivsdóttir Hansen, at ávísar vørur, ofta reingerðar- ella reinsievni, innihalda kemikaliur, sum tálma ella drepa vøkstur. Eitt nú illgras, algir, soppar ella bakteriur. Eisini finst bakteriutálmandi evni triclosan í nøkrum sløgum av tannkremi, sum fæst til keyps í dag. Sokallaðu bromeraðu flammutálmarar, t. d. PBDE, sum verður brúkt fyri at forða fyri at eldur tekur seg upp í elektronikki, t.d. teldum, útvarpi og sjónvarpi. Annað dømi eru ftalat'ini, sum hava tann eginleika at gera PVC plast bleytt, og hava tí verið brúkt í t.d. plastleikum. Annað dømi er TBT, tributyltin, sum tálmar gróðri, og hevur verið vanlig í botnmáling til bátar. PFOS verður brúkt til at impregnera klæðir, t.d. regnklæðir. Um tú eigur regnklæðir, sum kunnu »anda«, kanst tú rokna við, at tey eru impregnerað við PFOS. PFOS er enn eitt dømi um kemikaliur, sum tekur langa tíð um at verða niðurbrotið og eru funnið í livandi verum. Í Norra hevur PFOS verið ávíst í menniskjablóði, og har varð avleiðingin, at forboð nú er sett móti at brúka PFOS í klæðum. Forboðið kom í gildi 1. juli í fjør. Eisini í Føroyum er PFOS funnið í menniskjablóði. Men her eru ongar reglur á økinum, so til ber ikki at seta slíkt forboð í gildi.

Samanumtikið er listin yvir skaðilig árin av umhvørvisfremmandum kemikalium langur.

- Kemikaliur kunnu til dømis vera krabbameinselvandi, elva til ólag á hormonskipanina, t.d. evni at nørast, elva til at immunskipanin viknar og til skaðar á DNA arvastrongin. Kemikaliur kunnu vera skaðilig fyri fostur, sum yvirhøvur eru serliga viðkvom fyri umhvørvisfremmandum evnum, sigur Maria Gunnleivsdóttir Hansen.

Hon vísir á, at ein av niðurstøðunum á altjóða ráðstevnu í Norðurlandahúsinum í mai 2007 um týdningin av umhvørvinum í móðurlívi fyri heilsuna seinni í lívinum, var at fólk, sum í fosturlívi verða útsett fyri kemiskum dálkingarevnum, kunnu seinni í lívinum hava vánaligt mótstøðuføri móti sjúkum. Og eisini terra børn kunnu arva tað vánaliga mótstøðuførið.

### Manglandi reglur

Í Føroyum er onki eftirlit og ongar reglur um framleiðslu, innflutning og nýtslu av kemikalium. Vørur og kemikaliur, sum onnur lond ikki ynskja at innflyta ella brúka, kunnu tí lættliga enda í Føroyum.

- Vørur, sum í øðrum londum verða afturkallaðar, tí tær innihalda óynskt kemikaliur, kunnu vit í Føroyum lítið og einki gera við, staðfestir Maria Gunnleivsdóttir Hansen, og heldur fram:

- Heldur enn at sita hendur í favn og vóna at kemikaliulóggávur í øðrum londum eisini verjir okkum her á landi, eigur Løgtingið at samtykkja lógir so vit á ein virðiliga hátt kunnu verða við til at minka um framleiðslu og nýtslu av tilfari og vørum sum innihalda skaðilig kemikaliur.

Eftir hennara tykki eigur løgtingið at taka undir við altjóða lóggávu innan kemikaliuøki og implementerað reglurnar í føroyska kemikaliurlóg. Tað kann gerast við at samtykkja Stockholm sáttmálan, sum er ein altjóða avtala undir ST, ið ásetir reglur fyri innog útflutning av 12 ymiskum, vandamiklum kemikalium.

Í 2001 samtykti løgtingið sonevndu POP-protokollina, ið eisini skal regulera vandamikil, kemisk evni. Men enn er protokollin ikki sett í gildi.

Harumframt eigur løgtingið at kanna møguleikarnar fyri at seta í gildi ES-kemikaliulóggávuna REACH, sum er ein felags skráseting og regulering av nýggjum og verandi kemiskum evnum. Endamálið er at verja menniskju og umhvørvi móti vandamiklum kemikalium. Skipanin kom í gildi í øllum ES-londum 1. juni í fjør, og EFTA arbeiðir við at seta somu skipan í gildi.

Í juni í fjør heitti Umhvørvisstovan á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni á Innlendismálaráðið og Vinnumálaráðið um at seta REACH í gildi í Føroyum. Í brævi, dagfest 6. juni, skrivar Umhvørvisstovan m.a. soleiðis:

»Í Føroyum eru ongar reglur um framleiðslu, innflutning og nýtslu av kemikalium, einki eftirlit og heldur einki yvirlit yvir støðuna. Vørur og kemikaliur, sum onnur lond hvørki ynskja at innflyta ella brúka, kunnu tí lættliga enda í Føroyum. Nýggja EU fyriskipanin REACH er tí eitt upplagt høvi at fáa hóskandi reglur á kemikaliuøkinum í Føroyum og nógv talar fyri at gera eina føroyska kemikaliulóg grundað á REACH sum skjótast. Heilsufrøðiliga starvsstovan vil við hesum mæla til at REACH eisini verður sett í gildið í Føroyum.

Men REACH er framvegis ikki sett í gildi í Føroyum.

## FAKTA

**Um REACH, nýggju ES kemikaliulóggávuna**

Endamálið við Reach er at verja menniskju og umhvørvi, at økja kappingarevni og nýhugsan hjá virkjum, umframt at skipa felags reglur í øllum ES limalondum. REACH (Registration, Evaluation, Authorisation and Chemicals) inniber m.a. eina eina felags skráseting og regulering av nýggjum og verandi kemiskum evnum. Eitt nýtt kemikaliuagentur í Helsinki skal í 2018 hava skrásett útvið 30.000 kemisk evni. Eisini skal lóggávan tryggja, at brúkarar, innflytarar og framleiðarar ikki kunnu brúka vandamestu evnini fyrr enn hesi eru góðkend. Er til dømis talan um evni, sum eru krabbameinselvandi, eitrandi, hormonórógvandi, nøringarskaðilig, seint niðurbrótilig og evni, sum upphópast í livandi verum. Eisini skal framleiðari ella innflytari prógva, at evni brúkt í framleiðslu ikki eru skaðilig fyri heilsu og umhvørvi. 1. juni 2007 var REACH sett í gildi í øllum londum kring okkum. Eisini Norra og Ísland eru gjøgnum teirra EFTA-limaskap í ferð við at seta REACH í gildi.

Sosialurin og Rás2 seta fokus á náttúru- og umhvørvismál. Í blaðnum í morgin umrøða vit onnur viðurskifti á økinum, og mikukvøldi klokkan 1930 verða náttúru- og umhvørvismál evni á politiskum Trapputingi í Miðlahúsinum. Trapputingið, ið verður skipað í samstarvi við Lívfrøðingafelagið, verður sent beinleiðis á Rás2.